## Sosialurin viðmælir

**13:00-14:00 Súkklurnar fram! Komið og súkklið frá Ítróttarhøllini á Hálsi gjøgnum miðbýin, út til Tekniska skúla. Hetta er sami teinur, sum SIC framførir í tónleiki á Tjóðpallinum á midnátt**



**14:00-17:00 Karius og Baktus í Grasagarði. Barnatannrøktin, sum verður 50 ár, skipar fyri tiltakinum**
**14:00-17:00 Hin góði matpakkin í Grasagarði. Við plakat, faldara og mateskju, ið øll fáa sum gávu, kunnar Fyribyrgingarráðið um hin góða matpakkan**
**17:00 Óli Jacobsen vísir runt og sigur frá í Gamla Kirkjugarði Óli hevur higartil skrivað 100 greinar úr Gamla Kirkjugarði. Rundferðin byrjar við høvuðsportrið**



**18:00-22:00 Ríkisumboðið er opið fyri almenninginum Amtmansgarðurin er opin. Kl 20:00 syngur kórið Dropar**
**19:00-23:00 Müllers Pakkhús Býarløg - myndlistaframsýning, Inger Smærup Sørensen er kurator og setur framsýningina Listafólkini eru Hanni Bjartalíð, Hansina Iversen og Anker Mortensen. Eftir setanina lesur Oddfríður Marni Rasmussen yrkingar**
**20:00 og 21:30 M/S Thorshavn, Lágakai. Stuttur sightseeing túrur út um Havnina, tilmelding umborð**
**20:30 TUTL, Glade Hjørn Bólkurin Marius spælir**



**23:00 Havnar Kirkja. Svenskur og bulgarskur fólkatónleikur. Anna Katrina Petersen, sangur, Angelika Nielsen, violin, Mikael Blak, kontrabas**
**23:30 Vaglið. Happening undir opnum himni mitt á Vaglinum**
**24:00-01:00 Tjóðpallurin**
**100 ár - 1000 sár, rokkbólkurin SIC framførir bílagt tónleikaverk, ið er ein biltúrur gjøgnum miðbýin aftur við filmi hjá Landsverkfrøðinginum frá 1977. Lagið er heilar níggju minuttir til longdar. Meir vil SIC ikki avdúka um lagið. Konsertin við SIC er almenn og ókeypis**

## Kirkjugarðurin á Svínaryggi:

# Mest søguliga stað í Føroyum



*Útvið 3.000 fólk eru grivin í gamla kirkjugarði. Mentanarnáttina fer Óli Jacobsen at greiða frá um søguna hjá kirkjugarðinum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Søgan um fólkið í Havn kann upplivast í gamla kirkjugarði í Havn Mentanarnáttina, tá Óli Jacobsen fer at greiða frá um nøkur av teimum 3.000, ið eru grivin har

Tað kann illa hugsast eitt meira søguligt stað enn gamli kirkjugarður í Havn. Tað var havnarprestur Rasmus Jørgen Winther, sum fekk hann lagdan á Svínaryggi burtur frá kirkjuni, sum ikki var tað vanliga tá. Kristi Himmalferðardag í 1782 varð nýggi kirkjugarðurin vígdur.

Síðan tá eru um 3.000 fólk grivin her. Í 1869 verður byrjað at føra protokol yvir tey grivnu, men tað sæst ikki, hvar í kirkjugarðinum tey liggja. Í hesi protokol eru um 2.000 nøvn. Gamli kirkjugarður var í 1935 avloystur av nýggja kirkjugarði.

Tað eru bert tey fægstu, sum hava gravstein í gamla kirkjugarði. Hóast tað munnu vera einir 400 steinar. Á teimum flestu síggjast eisini nøvnini á teimum grivnu.

Tí kann sigast, at hesin kirkjugarður er ein einastandandi minnisvarði yvir tey fólk sum liggja her og serliga yvir tey, sum hava stein.

Seinastu tvey árini hevur Óli Jacobsen í hósdagsblaðnum skrivað røðina Hendur ið Sleptu. Her verður skrivað søgan hjá ”eigarunum” av hvørjum einstøkum gravsteini. Tað hevur víst seg, at hetta er ein ótømandi søgukelda. Higartil eru skrivaðar 100 greinir, og tilfar er í hvussu er til 50 afturat.

Tað er hugtakandi at síggja, hvussu ymiskt lívið hevur verið hjá fólki. Men øll hava sína søgu. Nógvar av hesum søgum eru eisini spennandi og dramatiskar. Dømi um tað er søgan hesa vikuna um læknan, sum konan fær at taka eitur!

Tað hevur víst seg, at røðin er sera væl umtókt millum fólk. Hon er viðkomandi fyri nógv, sum so ella so hava samband við tey fólk, sum skrivað er um.

Her er talan um søguna um fólkið Havn. Men nógv teirra hava bæði røtur og eftirkomarar kring landið og eisini uttanfyri landoddarnar.

Her er fólk úr øllum stættum, um tað kann sigast so. Her eru arbeiðskonur, fiskimenn, skiparar og lærarar fyri at taka dømi.

Fríggjakvøldið kl. 17 verður møguleiki at fara ein túr í kirkjugarðin við Óla Jacobsen, har hann fer at greiða frá nøkrum av teimum, sum eru grivin har.

Vit hittast við høvuðsportrið í Dr. Jacobsensgøtu.

*Óli Jacobsen*
*olijacobsen@post.olivant.fo*

# Opið hús í Miðlahúsinum

Miðlahúsið hevur opið hús Mentanarnáttina, og fer at vísa arbeiðsplássið fram fyri almenninginum, sum hýsir Sosialinum og Rás2, umframt at arbeiðsplássið eisini ger tilfar til portalarnar hja Føroya Tele, portal.fo, sportal.fo og planet.fo., verður húsið eisini brúkt til kjakfundir og upplýsandi fundir og ráðstevnur og mentanarlig tiltøk.

Forstjórin í Miðlahúsinum, Jan Müller sigur, at hann eins og øll starvsfólkini eru fegin um at kunna vera partur av Mentanarnáttini í Havn.

- Miðlahúsið er vorðið so týðandi partur av miðbýnum, miðlaumhvørvinum og mentanarlívinum at vit kenna tað eisini sum eina ábyrgd og skyldu at hava

dyrnar opnar tá tiltøk eru í umhvørvinum, sigur Jan Müller.

Tann paradiskendi



Miðlagarðurin opin fyri almenninginum hetta kvøldið, og tríggir ymiskir tónleikarar vera at hoyra í Miðlahúsinum millum klokkan 20-23.00. Uni Arge, sum í fjør gav út sína fyrstu fløgu, og í løtuni leggur hond á sína næstu útgávu, verður millum tey trý syngjandi. Nýggjasti vinnarin av Ársins Songrødd, Birita Poulsen, verður eisini at hoyra, og dugnaligi Bárður Johannesen fer somuleiðis at syngja og spæla hetta kvøldið.

Øll eru vælkomin. Miðlahúsið bjóðar umframt tónleik eisini kaffi, te og smákøkur

*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*